FYLGISKJAL 7

LM-037/2025

Kommunufelagið

Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting
2. oktober 2025

Okkara j.nr.
25/06547-3

Málsviðgeri
Hans Kári Vang/Janus Haraldsen

Tygara j.nr.

Viðvíkjandi broyting í lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Á seinasta afturvendandi fundi millum landsstýrið og formansskapin í Kommunufelagnum – sum var tann 6. juni í ár – var avtalað, at farast skal undir at samla allar tænastur til fólk við demens hjá kommunalu heilsutænastunum. Hetta er ein broyting, sum er uppløgd at fremja, tí tað er nú einaferð soleiðis, at mesti fakkunnleikin, mestu royndirnar og mesta undirstøðukervið, tá tað umræður at veita tænastur til demensrakt, eru í kommunalu heilsutænastunum.

Verandi skipan er soleiðis, at kommunurnar veita tænastur til demensrakt yvir fólkapensjónsaldur, meðan Almannaverkið veitir tænastur til demensrakt undir fólkapensjónsaldur. Kommunurnar hava tó longu í dag skyldu til veita búpláss til demensrakt undir fólkapensjónsaldur. Verandi skipan er íkomin sum úrslit av avgerðum í Markamótsnevndini, men hon er ikki skynsom, og eigur tí ikki at halda fram.

Ein væleydnað flyting av uppgávum frá landinum til kommunurnar krevur altíð, at landsstýrið og kommunurnar í felag gera eitt munagott fyrireikingararbeiði bæði viðvíkjandi lóggávu og fígging. Síðan áðurnevnda fund, hevur nógv samskifti verið millum partarnar. Arbeiðsbólkar hava útgreinað økið og eisini umrøtt møguleikar fyri fíggjarleisti. Eisini hava partarnir umrøtt sjálvt lógaruppskotið.

Nú er komið so væl áleiðis, at Almanna- og mentamálaráðið hevur sent lógaruppskot til hoyringar. Við uppskotinum verða tey demensraktu undir fólkapensjónsaldur javnsett við fólkapensjónistar í mun til kommunala heilsutænastu.

Hetta hevur við sær, at tey fáa rætt til allar tær tænastur, sum kommunurnar veita fólkapensjónistum. Her er talan um til dømis dagtilhald, dagtilboð, ergoterapi, fysioterapi, fyribyrgjandi venjing, mattænastu, umlætting, koyritænastu, vegleiðing og annað. Eisini verða tey javnsett við fólkapensjónistar í mun til endurvenjing, viðlíkahaldsvenjing og umlættingarpláss. Rættin til kommunalt búpláss hava tey, sum nevnt, longu í dag.

Eisini fáa tey við broytingini atgongd til eina røð av tilboðum, sum kommunurnar í dag veita demenssjúkum fólkapensjónistum. Kommunalu tænasturnar til demenssjúk eru nógv mentar seinastu árini og eru í framhaldandi menning. Niðanfyri sæst yvirlit yvir tilboð og tænastur, sum tey 8 eldraøkini í dag veita demenssjúkum borgarum yvir fólkapensjónsaldur.

	Tórshavnar k	VEKS	Roðin	Nánd	NBH	Vesturvón	Økistænastan	BHS
Kommunalir demenssamskiparar	X	X	X	X	X	X	X	X
Kontaktpersónaskipan	X		X	X	X	X	X	
Fleksibul ansing í heiminum*	X		X	X	X			
Búpláss - demenspláss	X	X	X	X	X	X	X	X
Stutttíðarpláss/umlætting	X	X	X	X	X	X	X	X
Vikuskiftisumlætting	X		X	X	X			
Koyritænasta	X	X	X	X	X	X	X	X
Dagtilboð	X	X	X	X	X	X	X	X
Kvøldtilboð	X		X	X	X			
Mattænasta	X	X	X	X	X	X	X	X
Venjingartilboð	X	X	X	X	X	X	X	X
Samrøðubólkar til borgarar og avarðandi	Á**		X	X	X	X		X
CST- bólkur	Á**		X	X		X		X

* Tá avvarðandi skulu í brúdleyp, føðingardag, kvøldskúla og líknandi

**Ávegis – arbeitt verður við at seta hesa tænastu í verk

Samanlagt hevur flytingin sostatt við sær, at tey demensraktu undir fólkapensjónsaldur fáa atgongd til eina røð av góðum tilboðum, sum eru í áhaldandi menning.

Í mun til tey tilboð, sum Almannaverkið veitir í dag, so er talan um tilboð, sum eru í nærumhvørvinum hjá borgaranum.

Kommunufelagið er av tí av tí greiðu fatan, at flytingin bæði fer at betra um heilsuna og um trivnaðin hjá demensraktum borgarum undir fólkapensjónsaldur.

Óvist hvussu nógv flytingin kemur at kosta kommununum

Tað ber tó illa til at siga, hvussu nógv tað fer at kosta kommununum samanlagt at yvirtaka tænastuna. Fyri einstøku kommunurnar er tað uppaftur truplari at siga, tí talan er um eitt lutfalsliga lítið tal av borgarum, sum búgva ymsa staðni í landinum og sum hava ymiskan tørv.

Sambært lógaruppskotinum, so eru í dag 19 heimabúgvandi borgarar, sum hava tilknýti til demensklinikkina. Av hesum koma bara 2 í dagtilboð. Harafturat kemur so nakað av umlætting, men ongantíð fleiri enn 1-3 í senn. Sum skilst er orsøkin til avmarkaða virksemi tann, at fólk ikki søkja sær tilboð fyrr enn sjúkan veruliga hevur tikið dik á seg.

Tá tænastan verður flutt til kommunurnar má roknast við væl meira virksemi, tí nú verða tilboðini nærri borgaranum. Eisini hava kommunurnar betri fyritreytir og størri royndir í sambandi við at gera tað uppsøkjandi arbeiði, sum skal til fyri at fáa tey demenssjúku at koma í tilboðini. Skipanin í kommunum er soleiðis, at kommunalu demenssamskipararnir eru við á heimavitjanum longu í útgreiningarfasuni, og fylgja borgaranum áhaldandi. Roknast má tí við at væl fleiri enn í dag – vónandi øll – fara at verða fevnd av onkrum slag av tilboð.

Ung og eldri eru ikki altíð sambærlig

At kommunurnar yvirtaka tey yngru demensraktu kann sjálvandi hava við sær ávísar stórrakstrarfyrimunir. Men soleiðis er tó ikki á øllum økjum. Tí havast má í huga, at tað í ávísum førum kunnu verða stórar avbjóðingar við at bjóða yngri demensraktum dagtilhald saman við eldri borgarum sum eru nógv eldri – oftast omanfyri 80 ár.

Fólk undir pensjónsaldur eru ofta í eini aðrari lívsstøðu. Tey hava kanska børn heima, makin arbeiðir enn, og tey hava vanar, sum líkjast teirra javnaldrum í arbeiðsførum aldri. Tá hesi verða sett saman við eldri borgarum, sum eru í eini heilt aðrari støðu – kanska við fysiskum veikleika, róligum gerandisdegi og einum øðrum sosialum lívi – kann tað elva til mismun, og tey yngru kenna seg ofta ikki væl.

Ein onnur týdningarmikil avbjóðing er speglingin. Tey spegla seg ofta í øðrum og finna sjálvsfatan í samskiftinum og samveruni. Tá ein 60 ára gamal maður, sum framvegis er kropsliga væl fyri og er virkin, verður settur saman við einum bólki av umleið 85 ára gomlum, sum kanska ikki eru væl fyri kropsliga, er vandin fyri, at hann speglar seg í teirra støðu – og missir bæði dirvi, virðing og sjálvsfatan. Tað kann skapa eina kenslu av mótloysi og passiviteti, heldur enn at eggja til virkni og lívsgleði.

Tí er tað týdningarmikið, at dagtilboð til fólk við demens, í ein ávísan mun, taka hædd fyri aldurssamanseting. Yngri fólk við demens hava tørv á einum tilboði, har tey kunnu kenna seg aftur í øðrum. Tænasturnar mugu tí skipast við virðing fyri einstaka tørvinum og fyri tí menniskjaligu virðing, sum liggur í at verða møttur har, sum ein er staddur í lívinum.

Hetta, at ung og eldri ikki altíð rúmast í sama dagtilboð hevur ein eyka kostnað við sær, tí kommunurnar mugu stovna nýggj dagtilboð. Kommunalu heilsutænasturnar eru skipaðar í 8 samstarvsøkir, sum eru sera ymisk í støddd. Í summum økjum eru í løtuni ongi demenssjúk undir fólkapensjónsaldur, meðan tað í øðrum økjum eru lutfalsliga nógv í mun til fólkatalið. Hetta býtið millum økini verður sjálvandi skiftandi sum frálíður. Tað er tí neyvan skynsamt at stovna sjálvstøðug dagtilboð til yngri demensrakt í øllum 8 økjunum. Neyðugt verður tí við ávísum samstarvi millum økini um felags dagtilboð.

Fíggingarleistur
Viðvíkjandi fígging, so er ætlanin, at verandi játtan á 4,6 milliónur krónur skal flytast til kommununar í sambandi við, at tær yvirtaka tænastuna. Talan er um tann kostnað, sum Almannaverkið í ár hevur av dagtilhaldinum í Tórshavn (2 milliónur krónur) og dagtilhaldinum á Glyvrum (2,4 milliónur krónur), harafturat koma so góðar 200 túsund krónur, sum Almannaverkið í dag keypir umlætting fyri frá kommununum.

Ætlaði fíggingarleisturin er tann, at landskassin yvirtekur tær útreiðslur, sum kommununar í dag hava av lærlingaundirvísiningini, meðan kommununar hinvegin yvirtaka tænasturnar til tey demensraktu undir fólkapensjónsaldur. Í dag er tað soleiðis, at kommununar rinda 20% av skúlaundirvísingini hjá lærlingum. Henda upphædd er umleið 4,6 milliónur krónur árliga, og samsvarar sostatt við ta upphædd, sum landsstýrið ætlar at flyta kommununum. So viðvíkjandi fíggingini kann sigast, at landið og kommununar hava gjørt eitt slag av gerðabýti. Ein skilagóð og einføld loysn, sum eisini hevur við sær, at land og kommunur sleppa undan umsitingarliga kostnaðinum av lærlingagjaldinum.

Men sum greitt frá omanfyri, so er enn óvist, hvussu nógv flytingin kemur at kosta kommununum. Tað kann bara tíðin vísa. Men verða útreiðslurnar munandi størri enn tær 4,6 milliónir krónurnar, so ber altíð til at taka tað við í arbeiðið viðvíkjandi einum framtíðar fíggingarleisti fyri eldraøkið, sum Kommunufelagið og Fíggjarmálaráðið fara undir í næstum.

At farast skal undir at endurskoða fíggingina av eldraøkinum var greitt avtalað á áður umrødda fundi tann 6. juni í ár.

Samanumtikið er talan um eina lógarbroyting, sum Kommunufelagið tekur undir við, og sum er úrslitið av einari jaligari tilgongd, sum Kommunufelagið hevur fingið høvi til at luttaka í longu frá byrjan og til endaliga uppskotið. Kommunufelagið hevur tí ongar viðmerkingar til sjálvt lógaruppskotið.

Men nú lógin verður broytt, so vil Kommunufelagið í sama viðfangi loyva sær at vísa á nøkur fá viðurskifti í lógini, sum eiga at verða broytt um somu leið:

Heitið á lógini fylgja við tíðini
Eftir góð 10 ára royndir við hesum øki á kommunalum honum, og tí menning og broyting, sum hevur verið hesi árini, so er heitið á lógini vorðið nakað ótíðarhóskandi. Kommununar hava støðugt fingið fleiri uppgávur at røkja, m.a. innan venjing, eins kommununar hava ment nógv um samlaða tilboðið, ið verður veitt í økinum. Kommununar veita sostatt í alsamt størri mun heilsutænastur og til ein alsamt vaksandi bólk – sum eisini veksur við hesi lógarbroyting.
Kommununar ynskja tí, at lógin fær eitt nýtt heiti og at hon samstundis fær tilskilað eitt stytt heiti. Vit skjóta upp **Løgtingslóg um kommunalar bú- og heilsutænastur (Bú- og heilsutænastulógin)**.

Ansingarsamsýning eisini til yngri borgarar

Ansingarsamsýning verður í verki nýtt sum eitt alternativ til fast búpláss til borgarar, sum hava tørv á hjálp og røkt alt samdøgrið. Stundum er tað tí, at tað er tað, sum familjan ynskir og stundum er tað ein fyribils loysn inntil eitt pláss er tøkt á røktarheimi. Tað er av týdningi fyri kommunurnar, at tað eisini verður heimild fyri at veita ansingarsamsýning fyri at ansa hesum nýggja bólkinum heima.

Í broytingaruppskotinum verður lagt upp til eina broyting í einari røð av tænastuásetingum. Ásetingin um ansingarsamsýning er ikki ein av hesum. Tað er ógreitt fyri okkum, um tað er tí ráðið metir at verandi orðing er nøktandi. Vit mæla til, at hetta verður eftirhugt, og at tað í minsta lagi í viðmerkingunum til broytingarlógaruppskotið verður gjørt greitt, at tað er heimild fyri at játta ansingarsamsýning til at ansa heima borgara undir fólkapensjónsaldur við demens. Og er ikki heimild, so eigur hendan heimild at verða fingið til vega, áðrenn uppskotið verður endaliga samtykt.

Tænasturnar eru til ung sum eldri

Við hesum uppskotið verður enn eina ferð gjørt greitt, at kommunalu bú- og heilsutænasturnar skulu veitast fyri einum breiðari bólki enn gjørt varð, tá ið økið varð lagt út til kommunurnar.

Kommunurnar halda tí, at tað hevði sømt seg um allir borgarar og avvarandi kundu kent seg aftur í orðingunum, sum verða nýttar í lógini. Hetta kann eisini síggjast í framhaldi av okkara ynski um at broyta heitið á lógini.

Orð sum "eldraráð" (§ 6, stk. 2) og "eldrasambýli"/"eldrasambýlinum" (§ 13, stk. 2, nr. 2, § 14, stk. 1 og 2, og § 15, stk. 1 og 2) eiga sostatt at verða broytt. Vit skjóta heilt einfalt upp at taka fyrra partin av orðunum burtur, so talan verður um "ráð" og "sambýli".

Fylgibroyting av komandi eftirlitinum við eldraøkinum

Kommunurnar eru sum kunnugt í góðum samskiftið við landsstýrið um komandi eftirlitskunngerðina – eitt samskifti, ið kom í lag stutt eftir, at Løgtingsins umboðsmaður heitt á aðalráðið um at gera reglur á hesum øki.

Í hesum samskifti eru kommunurnar vorðnar varugar við eina avbjóðing við verandi regluverki og samspæl tess við lógina um innlit í fyrisitingina. Útgangsstøðið er sostatt, at tað tá ið innanhýsis skjøl verða latin øðrum øðrum myndugleika, so verða tey ikki mett at vera innanhýsis longur. Harvið fær almenningurin krav uppá alment innlit í innanhýsis skjølini.

Hetta meta vit vera stak óheppið.

Kommunufelagið kann óttast fyri, at kommunalu bú- og heilsutænasturnar fara at halda seg aftur við at lata innanhýsis skjøl til eftirlitið av somu orsøk, og at hetta tískil fer at vera til munandi ampa fyri einum effektivum eftirliti. Tað er heldur ikki í samsvari við vanligar reglur á øðrum samanberiligum økjum, t.d. um eftirlitið hjá Løgtingsins umboðsmanni og eftirlitið hjá landsstýrismanninum við kommununum sambært § 48, stk. 2, í kommunustýrislógini.

Kommunurnar mæla tí til, at § 19, stk. 3, um eftirlitið verður orðað nakað soleiðis: "Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um eftirlit. Skjøl hjá kommununum, sum sambært

lógini um alment innlit og fyrisitingarlógini eru innanhýsis, verða framhaldandi at meta sum innanhýsis skjøl, hóast tey verða latin eftirlitinum í sambandi við eftirlit sambært 1. pkt."

Fyrisitingarliga tungar mannagongdir mugu steðgast
Formelt er tað krav, at allar tænastur á eldraøkinum – eitt nú búpláss, umlætting og reingerðartænasta – verða veittar gjøgnum fyrisitingarligar avgerðir við grundgeving, hoyring og kærurætti. Hetta hevur tó víst seg at vera ein tung byrða, bæði fyri kommunurnar og fyri borgararnar. Skipanin ger arbeiðið nógv tyngri, og hevur í veruleikanum lítlan og ongan týdning fyri tann einstaka borgaran.

Orsøkin er einfald: tað er altíð tann staðbundna heilsufakliga metingin hjá, sum er avgerandi fyri, hvørja tænastu borgarin skal hava. Ongin kærumyndugleiki hevur í praksis møguleika at broyta eina staðbundna fakliga meting, og kæruræturin verður tí meira ein formalitetur enn ein veruligur rættur. Samstundis verða borgarar alsamt meira tilvitaðir um sín rætt at kæra, og hetta fer í framtíðini bert at økja um talið av kærumálum. Úrslitið verður, at umsitingarnar í kommununum støðugt verða tyngdar enn meiri av fyrisitingarligum arbeiði, sum ikki hevur nakað beinleiðis við kjarnuuppgávuna at gera.

Eldraøkini veita sum nevnt heilsutænastur og kunnu á mangan hátt sammetast við virksemið í sjúkrahúsverkinum. Men meðan allar avgerðir í sjúkrahúsverkinum verða tiknar sum fakligar metingar, sum ikki kunnu kærast, verða kommunurnar bundnar í eini nógv tyngri skipan. Hetta førir til, at starvsfólkini noyðast brúka tíð og orku upp á fyrisitingarligt arbeiði heldur enn at brúka síni fakligu evni til beinleiðis røkt og hjálp.

Eftirlit og borgaravernd verða kortini tryggjað – eisini hóast tilboðini frameftir ikki skulu veitast við støði í einari fyrisitingarligari avgerð. Landslæknin, Dátueftirlitið og Løgtingsins umboðsmaður hava framhaldandi sínar eftirlitsleiklutir, eins og ein nýggj eftirlitskunngerð sum kunnugt er á veg. Tað er tí ongin vandi fyri, at borgarin verður fyri munandi verri staddur, um skipanin við fyrisitingarligum avgerðum fellur burtur. Tvørturímóti fáa vit eina einfaldari skipan, har starvsfólkini kunnu brúka tíðina upp á tað, sum veruliga hevur týdning: at veita borgarunum bestu tænasturnar.

Vegna
Kommunufelagið

Torbjørn Jacobsen
formaður

Eyðun Christiansen
stjóri